Heilsumálaráðið
Eirargarður 2
110 Tórshavn

Tórshavn, 18. apríl 2013
Journal nr.: 12/00968-5
Viðgjørt: HZ
Tygara skriv:

# Mál- og avrikssáttmáli millum

Landssjúkrahúsið

og

Heilsumálaráðið

2013

## Avrikssáttmáli millum Heilsumálaráðið og Landssjúkrahúsið fyri 2013

### 1. Inngangur

18. juni 2012 inngingu Heilsumálaráðið og Landssjúkrahúsið Mál- og avrikssáttmála fyri komandi árið. Sum liður í at slíkir sáttmálar skulu fylgja kalendaraárinum verður hervið gjørd ein skiftisavtala, ið gongur frá januar 2013 til desember 2013, har fleiri av verkevninum frá undanfarnu avtalu verða víðariførd og útbygd og onnur løgd afturat. Sáttmálin fevnir ikki um vanligt afturvendandi virksemi, men er dentur lagdur á tey mál, sum Landssjúkrahúsið og Heilsumálaráðið hava sett sær fyri at fremja í 2013, og sum serliga stuðla undir visjónina og/ella framtíðar menningina av Landssjúkrahúsinum.

| | |
|---|---|
| **Okkara høvuðsuppgáva - misjón** | Landssjúkrahúsið veitir góða heilsutænastu á høgum fakligum støði. Vit menna og útbúgva okkara starvsfólk og fremja gransking. |
| **Okkara framtíðarmynd- visjón**<br><br>Tey 3 s'ini | **Sjúklingurin er í miðdeplinum**<br>Vit veita virðiliga, skjóta, góða og samanhangandi sjúkugreining (diagnostikk), viðgerð, røkt, heilsufremjan og endurmenning í samstarvi við sjúklingin og tey, ið varða av.<br><br>**Starvsfólkini eru errin av at arbeiða her**<br>Vit kenna, at vit arbeiða á einum góðum arbeiðsplássi, ið veitir dygga og álítandi tænastu. Vit trívast í arbeiðsumhvørvinum og kenna, at okkara arbeiði verður virt og okkara førleikar gagnnýttir og áhaldandi mentir.<br><br>**Samfelagið fær ágóðan av okkara virksemi**<br>Landssjúkrahúsið er ein tænastuveitari, sum allir borgarar í landinum kenna seg tryggar við at venda sær til og nýta. |
| **Fokusøkið 2013** | Trygd & dygd í sjúklingagongdum og tænastum |

| 5 strategisk mál fram til 2014: | |
|---|---|
| **Sjúklingur** | **1 Dygdin í sjúklingagongdini skal optimerast og tryggjast**<br>Trygd og dygd skal vera í allari viðgerð, tað er bæði fakliga, fyrisitingarliga og upplivda trygdin og dygdin hjá sjúklinginum. Endamálið er at sjúklingurin er í miðdeplinum og kennir seg tryggan. Tvørsektorsamstarvið og umskiftið skal áhaldandi betrast við atliti til trygd og dygd. |
| **Starvsfólki** | **2 Starvsfólkini skulu vera væl útbúgvin og trívast**<br>Menning skal tryggja høgt førleika- og útbúgvingarstøði hjá starvsfólkunum. Góður trivnaður skapar grundarlag fyri nøgdsemi. Útbúgvingarstøðið skal verða tryggjað við skipaðari og miðvísari eftirútbúgving og førleikamenning fyri allar starvsfólkabólkar. Nøgdsemi skal m.a. tryggjast, við at førleikarnir hjá starvsfólkunum verða virdir og gagnnýttir, arbeiðast skal bæði við at bøta um fysisku karmarnar og sálarliga arbeiðsumhvørvið. Starvsfólk eru við, tá nýhugsan og broytingartilgongdir verða gjørdar. Landssjúkrahúsið eggjar og stuðlar starvsfólkum at fara undir gransking. Samstarvið við útbúgvingarstovnar innanlands- og uttanlands verður ment. |
| **Samskifti** | **3 Samskiftið skal vera eitt virkið amboð**<br>Tilvitað og professionelt samskifti skal tryggja høgt kunningarstøði. Samskiftið við sjúkling og tey, ið varða av, er týðandi partur í eini sjúklingagongd. Gott samskifti skal stuðla undir gott samstarv innanhýsis á stovninum og millum Landssjúkrahúsið og aðrar samstarvsstovnar. Samskiftið virkar fyri góðum umdømi hjá Landssjúkrahúsinum í samfelagnum sum heild. Sjúklingar, avvarðandi, almenningurin, fjølmiðlar og politikarar fáa gagn av høgum kunningarstøði. Fokus verður sett á at miðla vitan gjøgnum undirvísing, skrivligt tilfar/faldarar og elektroniskar miðlar. |
| **KT** | **4 KT skal stuðla øllum arbeiði**<br>KT er neyðugt grundarlag og amboð í heilsufakliga og umsitingarliga arbeiðinum á Landssjúkrahúsinum. Alt viðkomandi dáta skal verða skrásett – líka frá fíggjarligum upplýsingum og hagtølum, til kanningarúrslit og upplýsingar um viðgerðir. Somuleiðis skulu allar mannagongdir gerast teldutøkar í eini felags skjalaskipan fyri alt sjúkrahúsið. Landssjúkrahúsið miðar ímóti at verða talgilt/pappírleyst innan øll virkisøki. KT skal tryggja opinleika og høgt kunningarstig. Sjúklingar, |

| | |
|---|---|
| | avvarðandi og samfelagið skulu fáa nøktandi innlit í virksemið hjá Landssjúkrahúsinum, samstundis sum persóns- og trúnaðar upplýsingar verða vardir |
| **Tilfeingi** | **5 Alt tilfeingið skal brúkast munagott**<br>Við tilfeingi, verður hugsað um alt tilfeingið, ið stovnurin hevur frá fíggjarligu játtanini, bygningum, tólum til starvsfólk. Virksemið á Landssjúkrahúsinum skal verða skipað og umsitið soleiðis, at alt tilfeingið verður gagnnýtt á besta hátt við m.a. støði í hugsanarháttir innan framleidni og virkisføri. Vitanin á Landssjúkrahúsinum skal verða tryggjað, og skipanir og mannagongdir skulu áhaldandi mennast og dagførast. |

## Stutt um strategiarbeiðið

Strategiarbeiðið varð sett aftur á dagsskrá í 2011, og m.a. hava framtíðar avbjóðingar hjá Landssjúkrahúsinum verið umrøddar og hvussu hesar verða møttir. Farið varð undir at dagføra virðini hjá Landssjúkrahúsinum. Í 2011 var eisini fokus sett á samskifti, og nærum øll starvsfólk við leiðandi leikluti vóru til seminar um týdningin av góðum samskifti við sjúklingar, avvarðandi og innanhýsis. Eisini varð arbeitt við at økja medvitið um týdningin og kravið til gransking á sjúkrahúsinum; hetta sæst aftur í øktum granskingarvirksemi.

Í 2012 hava fleir deplar og deildir umrøtt samskifti og virðir, so starvsfólk fáa møguleika at ávirka og leggja samskiftisuppgávurnar til rættis, sjúklingum, avvarðandi og eisini Landssjúkrahúsinum at frama.

Í sambandi við mál og avrik 2012, hevur dentur verið lagdur á, at ikki bert leiðslubólkur, men eisini deildarleiðarar hava givið sítt íkast, og tí vóru í november 70 depils- og deildarleiðarar og yvirlæknar savnaðir at umrøða avbjóðingar og virksemi fyri komandi árið. Hetta arbeiðið heldur áfram í 2013.

## Fokusøkið í 2013 - Trygd & dygd í sjúklingagongdum og tænastum

**Stutt um tiltøk í 2013**
At bøta um sjúklingagongdirnar er aðalmálið í øllum virkseminum á stovninum. Vísandi til 2 b), í hjárit 1 fara deplar at gera eina yvirskipaða ætlan fyri árið, sum deildarleiðarar og yvirlækna gera sína menningarætlan eftir. Endamálið við arbeiðinum er, at allir leiðarar og starvsfólk skulu kenna yvirskipaðu málini og sín leiklut í arbeiðinum at røkka hesum. Eisini her eru frymlar mentir, sum skulu gera tað einfalt og effektivt at gera ætlanir fyri deplar/deildir og sergreinar.
Samskiftið er týðandi partur í tí góðu sjúklingagongdini. Ein samskiftispolitkkur er orðaður og skal setast í verk í 2013. Hildið verður áfram við arbeiðinum at skapa ein dialog á deildini um tað góða samskiftið, í tí liggur eisini at starvsfólk á deildarfundum orða sínar samskiftisleiðreglur.

Yvirskipað hava vit í 2012 sett fokus á sjúklingatrygd. Í hesum liggur, at vit alsamt arbeiða við at fáa størri trygd og dygd, í tí vit gera, m.a. við at gera tillagingar, men eisini at royna nýggjar leiðir. Vit menna frymlar, sum skapar størri gjøgnumskygni og gera tað einfaldari at arbeiða við sjúklingagongdum.

**Íverksetan av dygdarskipan**
Akkreditering er okkara stevnumið, og Landssjúkrahúsið hevur sett verkevnir upp, sum eru fyrireikingar til eina framtíðar akkreditering, sí hjárit 1, 1 b. Arbeitt verður út frá uppritinum 'Uppskot at seta at í verk skipan, ið stuðlar undir Trygd & Dygd í Heilsuverkinum' frá 2011. M.a. er farið undir at skipað eitt dygdarráð, sum skal stinga út í kortið ein dygdarpolitikk.

Arbeitt verður við at implementera PLI – skjalaskipanina, sum er ein elektronisk skjalaskipan, sum heldur skil á øllum okkara politikkum, leiðreglum og instruksum. Menningin av THS-skipanini heldur fram við fokus á rætta nýtslu og neyva skráseting.

Skipað verður fyri LEAN-tiltøkum, sum skulu stuðla undir optimering av sjúklingagongdum, pappírleyst LS og optimering av arbeiðsgongdum og fyrisitingarligum processum.

**Sáttmálaskeið og frágreiðingar**

Sáttmálin er galdandi fyri árið 2013.

Eftirmeting verður gjørd í sambandi við samráðingar um nýggjan sáttmála í november 2013. Uppfylgjandi fundir eiga at verða millum Heilsumálaráðið og Landssjúkrahúsið, sum fylgja upp verkevnini, har Heilsumálaráðið eisini skal leggja sítt íkast.

Verða fortreytirnar munandi broyttar, eftir tað at hesin sáttmálin er undirskrivaður, kann samráðast um hann av nýggjum, ella hann verður tillagaður, eru partarnar samdir um tað.

Tórshavn, tann 6. mai 2013

| Landssjúkrahúsið | Heilsumálaráðið |
|---|---|
| ____________________ | ____________________ |
| Sigurð Ó Vang, stjóri | Turid Arge, aðalstjóri |

**Hjárit 1**

Út frá visjónini og teimum 5 lýstu strategisku málunum, hevur Landssjúkrahúsið sett verkevni og mál, sum skulu fremjast í 2013. Talvan niðan fyri vísir, hvussu verkevnini í 2013 eru knýtt at teimum 5 strategisku málunum.

| | Verkevni | Mál 1 - Sjúklingur | Mál 2 – Starvsfólk | Mál 3 - Samskifti | Mál 4 – KT | Mál 5 - Tilfeingið | Mál 2013 | HMR |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1a) | 'Tann góða sjúklingargongdin' | **X** | X | **X** | X | X | Arbeiða við fylgjandi sjúklingagongdum:<br>1) PSYK implementering av 5 sjúklingagongdum<br>2) Lýsa og implementering av PSYK sjúklingagongd innan ADHD og autismu spektrum<br>3) Lýsa og implementera Hjartasjúklingagongd (MED)<br>4) Implementera sársjúklingagongd (KIR)<br>5) Luttaka í HØST af effekter-verkætlanini<br>6) Lýsa og implementera uttanlands sjúklingagongd innan æðrakálking<br>7) 'WHO-Baby-friendly hospital' Viðgongu – og føðiøkið fylgja viður-kendum góðskuskipanum og akkreditering.<br>8) Tiltøk/amboð, sum styrkja um førleikarnar at arbeiða við sjúklingagongdum:<br>- menna brúk av lean amboðum, Visio til lýsing og greining av sjúklingagongdum.<br>- Sí eisini verkætlan 'pappírleyst LS', 4d) og Trygd&Dygd, 1b) | X |
| 1b) | Trygd&Dygd | **X** | X | **X** | | | - Flyting av øllum verandi leiðreglum yvir í PLI-skjalaskipanina<br>- skipa eina dygdarskipan<br>- orða ein dygdarpolitikk<br>- ótilætlaðar hendingar (ÓTH) royndarleistur orðast og royndarkoyrast á einari ella fleiri deildum/deplum.<br>- dagføra analysuinstruksir á LAB á DDKM-støði. | **X** |
| 1c) | Skráseta nosokomiskar infeksjónir | **X** | | | | X | Skipað skráseting av nosokomiskum infektiónum | |

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1d) | Samstarvsavtala við Almannaverkið | X | | **X** | | X | Avtala inngingin, sum setir fokus á tvørsektor samskiftið og samstarv til gagns fyri sjúklingarnar og effektiva tilfeingisnýtslu | **X** |
| 1e) | Samstarvsavtalu við Sernám og Tórshavnar Kommunu | X | | **X** | | X | Gera samstarvsavtalur | **X** |
| 2a) | Leiðaraførleikamenning | | X | | | X | 2 lið á 12 persónar gjøgnumføra eina LS-leiðslumenningargongd.<br>Leiðaranetverkið: 2 evnisdagar og 4 bólkafundir í 2013 | |
| 2b) | Organisatiónsmenning<br><br>Styrkja samskiftið og samstarvið innanhýsis | | **X** | **X** | | **X** | - deplar gera menningar-/ársætlan<br>- allar deildir arbeiða við at gera leiðreglur fyri samskifti og umrøða virðini aftanfyri LS-virksemið<br>- menna heimabeitið í sharepoint<br>- nøgdsemiskanning millum starvsfólk | |
| 2c) | Gransking | X | **X** | | | X | - skipa fyri tiltøkum í sambandi við granskingarpolitikkin, ið kunnu stimbra undir at granska.<br>- Gera samstarvsavtalu við Fróðskaparsetrið<br>- Hava søkt uttanhýsis fígging til í minsta lagi 5 verkætlanir<br>- klinisk kostverkætlan: Køkurin og MED/B6 fremja verkætlan, har deildin fær orkuríkan kost í smáum portiónum | |
| 2d) | Ætlanir og politikkar | X | X | **X** | | | - gera samskiftisætlan fyri LS/Virðir<br>- gera samsktispolitikk. Dagføra allar politikkar innan starvsfólkaøkið | |
| 2e) | Strategisk førleikamenning | X | **X** | | | X | Rekruttering av sergreinum<br>- introstørv innan anæstesiologi og ophtalmologi | **X** |
| 3a) | Betra kunningin og samskifti til sjúklingar/avvarðandi | **X** | | **X** | | X | - deplar og deildir framleiða tilfar/kunning til heimasíðu, kunningarskermar og faldarar, sí 2b)<br>- tillaga innkallingarbrøv í THS | **X** |
| 3b) | Styrkja samskiftið við samstarvsfelagar | | | **X** | | | - 3 dialogfundir/evnisdag fyri serlæknar og kommunulæknar<br>Gera samstarvsavtalu við Gigni | X |
| 3c) | Ávísingar | X | X | X | | X | Lýsa verandi støðu – máta svartíðir. Velja innsatsøkir, sum krevja ábøtur og bøta um kunningin og tænastuna til sjúklingin. | X |
| 4a) | KT-trygd og dygd | X | | X | **X** | | Fáa valt stýrisskipan og tøkni til teldilar/smáteldur, | **X** |

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | ið kunnu koyra THS og fáa gjørt royndir á 3 deildum. | |
| 4b) | ‘Pappírleyst’ LS – t-dagar 2013<br><br>Svar uppá sendiroyndir inn í THS beinleiðis | | | | **X**<br><br>**X** | | Fáa kravfest skipan til blóðjournal við atliti til at keypa skipan í 2014.<br><br>Fáa resterandi blankettir í THS. LAB fáa 90% av øllum svarum frá útlandinum elektroniskt.<br>Klinikk: t-dagar | **X** |
| 4c) | THS konsolidering<br><br>Fleiri skipanir og dagføringar í THS | X<br><br>X | | | X<br><br>X | X | Skjótt syftir seiðir átøk á KIR/Bráð/PSYK, meðan 2. runda verður fyrireikað.<br>- Uttanlandstænastan íverksetast saman við Hotell Tórshavn, EKG-datagrunnur og integratión til THS, SMS-boðtænasta til enn fleiri økir<br>- Íverkseta patologi skipanina (rekv./svar) | **X** |
| 5a) | Hagtøl /CI | X | X | X | **X** | **X** | Hvør depil velja út 10 økir/evnir har hagtøl ynskjast úr THS (framleiðsla, dygd, tilfeingi). Fyrst gera úttrekkini sum pivot og um neyðugt hareftir gera fasta koyring í SP ella CI. Gera tølini tilgongilig innanhýsis. | **X** |
| 5b) | Sterilsentral tænastur til eksternar kundar | X | | | | **X** | Framlagt avtaluuppskot fyri fleiri møguligum kundum | |
| 5 | Orkusparing – ravmagn og brenniolja | | | | | **X** | Lægri nýtsla skal verða eitt felags mál. Skipa verður fyri tilvitanartiltøkum og kunning.<br>Minka nýtsluna av olju og ravmagn.<br>Kannað verður, um tað eru støð, har serliga nógvur hiti verður mistur. Gera ætlan fyri at bøta um tað saman við Landsverk.<br>Taka støðu saman við Landsverk um farast skal yvir til fjarhita ella VITorku loysnir. | |
| 5 | Bíleggingar- og umsitingarskipan fyri íbúðarblokkarnar | | | | **X** | **X** | Út frá kravfesting gera útboð av skipan og íverkseta hana | |

Krossarnir eru settir í mun til, hvussu verkevnini (ella málini) ávirka tey 5 strategisku fokusøkini. Verkevni 1a) ’Tann góða sjúklingagongdin’ ávirkar øll 5 strategisku fokusøkini, tó mest sjúklingagongdina og samskiftið, fokusøkini 1 og 3, har krossarnir eru merktir við feitari skrift.

Verkevni 1d)’ Samstarvsavtala við Almannaverkið’ - ávirkar serliga strategisku málini 1, 3 og 5, tí betri samskifti gevur betri sjúklingagongd heilt út í primer sektorin og tilfeingi verður betri gagnnýtt (5). Eisini er krossur settur í seinasta teig, tí Heilsumálaráðið hevur ein aktivan leiklut.